# Tekniski Skúlin í Tórshavn søkir lærarar

**2 tímalærarar til maskindeildina**

Størvini eru tímalærarastørv, við møguleika fyri føstum starvi seinni.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum maskinsmiður og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun. Eisini er áhugi fyri stødd-, alis- og evnafrøði, CAD/CAM, CNC og nýtslu av EDV ein fyrimunur.

**Lærari til smiðjudeildina**

Starvið, sum er eitt fulltíðarstarv, umfatar undirvísing í rør og blikk.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum rør- og blikksmiður umframt hollan kunnleika til sveising. Eisini er áhugi fyri støddfrøði, náttúrulæru og nýtslu av EDV ein fyrimunur. Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun.

**Tímalærari til bildeildina**

Starvið er eitt tímalærarastarv, við møguleika fyri føstum starvi seinni.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum bilmekanikari umframt hollan kunnleika til plátuarbeiði og líming. Eisini er áhugi fyri støddfrøði, náttúrulæru og nýtslu av EDV ein fyrimunur. Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun.

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má verða til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg pedagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

**Løn:**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

– – – – – – – – –

Størvini skulu setast skjótast tilber og í seinasta lagi 1. august 2000.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 5. juni 2000.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlan, tlf. 31 19 57.

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**




Gravsteinar og kantsteinar.
Nú eisini úr føroyskum gróti

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Til útisetar í Danmark**
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað



**Danstein**
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN
www.danstein.fo


# Undirvísingar- og Mentamálastýrið

## Deildarstjóri til vinnu- og miðnámsskúladeildina

***Starvið:***
Nú deildarstjóri okkara er farin úr starvi er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum deildarstjóri leyst at søkja í Vinnu- og Miðnámsskúladeildini.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið er skipað við 3 deildum: Fólkaskúladeild, vinnu- og miðnámsskúladeild og mentamáladeild.

Høvuðsuppgávurnar hjá vinnu- og miðnámsskúladeildini eru at:
- Fyrisita hægru umsitingina av vinnu- og miðnámsútbúgvingum
- Leggja til rættis og menna útbúgvingarnar á økinum
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugabólkar
- Fremja samstarv við vinnulívið o.o., ið varða av økinum

Deildarstjórin er leiðari á vinnu- og miðnámsskúladeildini, og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini av deildini og teimum útbúgvingum, ið eru og koma á økinum. Deildarstjórin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at bygnaður og mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv.

***Førleikakrøv:***
Vit vænta okkum m.a. at umsøkjararnir hava
- Viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- Førleika til at menna samstarvið við vinnulívið og aðrar áhugabólkar
- Vilja og evni til at royna nýggjar leiðir
- Áhuga fyri avbjóðingum

***Vit bjóða:***
Undirvísingar- og Mentamálastýrið mennist alsamt og verður tú sjálv/sjálvur í stóran mun við til at skapa starvið.

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir, umframt uttanlandssamstarv.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhørvi tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan.

***Setanar- og lønartreytir:***
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna.

***Umsókn***
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:

Undirvísingar- og Mentamálstýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 5. juni 2000. Starvið verður sett frá 1. august 2000 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Undirvísingar- og mentamálastýrinum, á telefon 35 50 50.

*Undirvísingar- og mentamálastýrið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Í* ***vinnu- og miðnámsskúladeildini*** *eru Studentaskúlar, HF-skeið, Handilsskúlarnir, Teknisku skúlarnir, Fiskivinnuskúlin, Sjómansskúlarnir, Maskinmeistaraskúlin og lærlingaútbúgvingar.*


**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*


## Teknmálsskeið

Í komandi skúlaári skipar Sernámsdepilin fyri ymsum skeiðum í **Teknmáli og Tekn til Talu.**

Yvirlit yvir skeiðini fáast við at venda sær til Sernámsdepilin **tlf. 314522.**





*Hóast Sjúklingahotell Tórshavn fekk nógv fleiri seingjarpláss, tá tað í januar flutti inn í Tåsingegade 29 á Eysturbrúgv, so er tað ikki nóg mikið, tí í longri tíð hava fleiri fólk gist, enn tað er rúm fyri. - Tað kemst av, at tað eru ov nógv avvarandi á sjúklingahotellinum og tí mugu vit avmarkað talið av avvarðandi, sigur Ina Frisdahl, leiðari á Sjúklingahotellinum*

# Fult á Sjúklingahotellinum Tórshavn

*Føroyska hotellið í Keypmannahavn hevur trupulleikar við seingjatalinum og tí verður í framtíðini avmarkað, hvussu nógv avvarandi og børn sjúklingarnir sleppa at hava við sær á Sjúklingahotellið Tórshavn, sigur leiðarin Ina Frisdahl. — Vit hava í løtuni fleiri gestir enn vit hava pláss til, og tað ber ikki til í longdini, sigur hon*

Sveinur Tróndarson

Tað er fullsett á Sjúklingahotellinum Tórshavn. Men tað er serliga tí, at tað eru so nógv avvarandi við teimum sjúku, at fult er, og tí sær leiðslan á hotellinum seg noyddan til, at gera stórar avmarkingar í talinum av avvarandi í nærmastu framtíð.

- Summarið stendur fyri framman, og tá hava sjúklingarnir ofta bæði trý og fýra avvarandi við til Danmarkar, og tað ber heilt einfalt ikki til, sigur Ina Frisdahl, leiðari á Sjúklingahotellinum Tórshavn. — Tí vera vit noydd til at gera avmarkingar, sum í fyrsta umfari kunnu tykjast órættvísar, men sum eru avgjørt neyðugar, skal hotellið vera eitt líkinda stað fyri sjúklingarnar, sum koma í fyrstu røð, leggur hon afturat.

### Átta fleiri enn pláss er til

Støðan hjá Sjúklingahotellinum broyttist annars munandi fyrr í ár. Hotellið flutti í nýggj og meira tíðarhóskandi hølir, sum samstundis høvdu fleiri seingjapláss. Mett var at tey 70 seingjaplássini fóru at nøkta tørvin eina rúma tíð fram, men soleiðis skuldi ikki vera.

Tíðin síðani februar mánað í ár hevur víst, at alsamt fleiri sjúklingar vera sendir til Danmarkar og tá teir samstundis hava fleiri avvarandi við sær á ferðini, er tað ein trupulleiki hjá leiðsluni á Sjúklingahotellinum Tórshavn. Bæði hvat plássi og hvat peningi viðvíkur.

Ina Frisdahl, leiðari, sigur, at í løtuni eru 78 fólk á sjúklingahotellinum, og tað merkir, at tað eru átta fólk fleiri enn tað í veruleikanum er pláss til.

Av teimum 78 sjúklingunum eru umleið 40 sjúklingar, meðan restin er avvarandi hjá sjúklingum. Tá vit siga avvarandi, hugsa vit um makar, børn og foreldur. Og tað er eftir øllum at døma júst her, at trupulleikin skal finnast.

- At ein sjúklingur, sum skal í drúgva viðgerð, hevur makan við, er ikki so løgið, men har mugu vit seta markið. Tað ber heilt einfalt ikki til at børnini og kanska foreldrini hjá sjúklinginum eisini koma við á sjúklingahotellið, sigur Ina, sum vísir á, at tað gongur út yvir dagin hjá hinum »gestunum« á sjúklingahotellinum.

### Sjúklingarnir í fyrstu røð

Tað er ikki ókent, at sjúklingar, sum skulu til Danmarkar í viðger, hava børnini við, og tað er heldur Ina heldur ikki vera nakað serliga løgið. Kortini gevur tað henni og hinum starvsfólkunum á sjúklingahotellinum trupulleikar.

- Fáa vit t. d. eitt krabbasjúkt barn á sjúklingahotellið, so verða vit, sum støðan er nú, noydd til at isolera tað frá øllum hinum, tí tað eru so nógv børn á hotellinum í løtuni. Tað kann ikki vera rætt, at ein sjúklingur, sum býr á hotellinum, skal noyðast í isolatión, tí onnur í gásareygum óviðkomandi, eisini búgva á hotellinum, sigur Ina.

Hon vísir á, at fremsta uppgávan hjá Sjúklingahotellinum er at vera sjúklingunum til hjálpar, men at tann parturin verður ikki nóg væl loystur í løtuni.

- Tí vera vit noydd til at seta strangari reglur fyri hvør kann koma við á hotellið og hvør ikki kann, sigur Ina, sum ikki dylir fyri, at tað er við bløðandi hjarta, at hon ger tað.

Nýggju reglarnir merkja m. a., at framyvir, sleppa systkin hjá sjúkum børnum ikki við á sjúklingahotellið. Børn hjá sjúklingum, sum skulu í drúgva viðger, sleppa heldur ikki at vera á sjúklingasjúkrahúsinum alla viðgerartíðina, men sleppa ístaðin at vitja av og á.

- So ætla vit eisini at gera ta avmarking, at bert ein avvarandi sleppur við hvørjum sjúklingi. Á tann hátt minka vit um talið av gestum og samstundis gera vit tað meira liviligt hjá sjúklingunum, sum mugu vera á hotellinum, sigur Ina Frisdahl.

Nógv fleiri avvarandi
Fyri at vísa gongdina í tølum greiðir Ina frá, at tað í dag koma nógv fleiri avvarandi við, enn tað gjørdu t. d. í 1994. Í veruleikanum er talið nærum tvífaldað, og tað ger lívið á sjúklingahotellinum truplari.

- Sjálvandi skal tað vera rímiligt, men rímiligheitin skal virka báðar vegir, sigur Ina, sum minnir á, at summarið stendur fyri durum.

- Fyrstu fýra mánaðirnar í 1994 høvdu 47 prosent av teimum, sum Landssjúkrahúsið sendi til viðgerar í Danmark avvarandi við, men samatíðarskeið í ár vísir, at umleið 81 prosent av sjúklingunum hava avvarandi við. Harafturat skalt tú hava í huga, at tað fyrstu fýra mánaðirnar í ár vóru sendir 119 fólk fleiri til viðgerar í Danmark enn tað vóru fyrstu fýra mánaðirnar í fjør, og hava átta av tíggju avvarandi við, so merkir tað 215 fleiri gestir á hotellinum. Tað merkist upp á so nógvar mátar, sigur Ina.

Hon leggur afturat, at tað um páskirnar í ár vóru 65 gestir á sjúklingahotellinum og at tað er nógva ferðir fleiri enn tað plagar. — Vanliga eru bara eini átta fólk á páskum, so tað sigur eitt sindur um gongdina, sigur Ina, sum leggur afturat, at tey eisin hava verið noydd til at brúka patienthotellið hjá Ríkissjúkrahúsinum fyri at nøkta tørvin.

- Slíkt kostar nógv eyka, og tað kann ikki vera meiningin, at vit skulu senda sjúklingar aðrastaðni, tá okkara hotell er har, sigur Ina Frisdahl at enda.

## Eingin lóg til liðbussin

Herfyri varð kunngjørt, at Strandferðslan hevði fingið ein nýggjan og stóran liðbuss. Harmonikubuss, sum onkur hevur valt at kalla hann. Sagt varð í fjølmiðlunum, at hann var at rokna sum "trailari við kerru", og at førarin mátti hava tilsvarandi koyrikort. Men hetta fekk fólk at hugsa um, at "trailari við kerru" hevur ikki loyvi at koyra skjótari enn 50 km/t, og at hesin bussur tí avgjørt ikki kláraði at halda rutuna, hann var settur til at røkja. Trupulleikin er, at hugtakið "liðbussur" finst ikki í galdandi ferðslulóg - men tað finst í nýggju ferðslulógini, sum kemur í gildi 1. juli. Tí hevur Bileftirlitið í samráð við fútan sum undantak góðkent liðbussin sum liðbuss samsvarandi nýggju ferðslulógini. Hann er sostatt fult lógligur á vegunum og kann eftir nýggju reglunum koyra 70 km/t.

**Kelda: Ferðslutrygd**


**FRAMSÝNING**
*í Smiðjuni í Lítluvík*

við Helga Joensen og Anker Eli Petersen

| | |
|---|---|
| Sunnudag 4. juni | kl. 14.00 - 20.00 |
| Mánad. 5. - leygard. 10. juni | kl. 11.00 - 20.00 |
| Sunnudag 11. juni | kl. 14.00 - 20.00 |




SMS - Tel. 353535 - Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo